## Kunngjørdu loyniligar upplýsingar

Amerikanskir myndugleikar hava av misgáum almannakunngjørt upplýsingar um millum annað støð í landinum, sum hava serstøðu sum trygdarmál. Talan er eitt nú um støð, sum gera tilfar og útvega ráevni til kjarnorkuídnaðin. Herumframt vóru ymsar loyniligar upplýsingar um amerikanska kjarnorkuídnaðin. New York Times skrivar, at tað var av misgáum, at frágreiðingin, sum er 266 blaðsíður stór, endaði á einari almennari heimasíðu. John Deutch, sum hevur arbeitt við kjarnorkutrygd í mong ár, heldur ikki, at tað fær nakrar avleiðingar, at tær loyniligu upplýsingarnar komu á alnótina.



## Minni kreppa í Avstralia

Hagtøl hjá avstralsku myndugleikunum benda á, at altjóða kreppan hevur ikki gjørt vart við seg har enn. Í hvussu er vísa tey seinastu tølini, at landsins bruttotjóðarframleiðsla vaks 0,4 prosent í mars mánaði. Myndugleikarnir siga kortini, at teir vænta, at búskapurin fer at tódna 0,2 prosent í ár, men tað er framvegis lítið samanborið við flestu onnur lond. Avstralska stjórnin hevur framt ymisk tiltøk, sum hava økt eftirspurningin innanlands. Hinvegin minkar útflutningurin orsakað av minni eftirspurningi aðrastaðni, og tað hevur kostað arbeiðspláss, skrivar Reuters.



# Lærarin slóðar fyri javnstøðu

**Skulu vit fáa fult gagn av øll tilfeinginum í samfelagnum, er neyðugt at fáa javnstøðu inn longu við móðurmjólkini. Tí skal skúlin nógv meira inn í hetta arbeiðið, halda norðurlendskir serfrøðingar**

UNDIRVÍSING
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Hini Norðurlondini arbeiða rættiliga miðvíst við javnstøðu í skúlunum. Bæði í mun til, hvussu gentu- og dreingjabørnini verða viðfarin, og ítøkiliga við at undirvísa í javnstøðu.

Í hesum londum fer umfatandi gransking fram innan evnið. Gransking, sum ferð eftir ferð staðfestir, at kvinnur og menn hava ikki líka møguleikar at mennast, og at liva tað lív, sum tey ynskja, tí kynsleiklutirnir eru so stirvnir.

Eisini vísir granskingin, at skúlabørn verða ikki viðfarin eins, men júst við støði í teimum traditionellu kynsmynstrunum, sum í stóran einsrætta lívsrúmið hjá tí einstaka.

Á norðurlendskari ráðstevnu um javstøðu í skúlanum, sum var í í Norðurlandahúsinum í gjár, vístu umboð fyri millum annað Danmark, Ísland og Svøríki á, hvussu teirra lond ítøkiliga gera, til tess at víðka um sjónarringin hjá lærarum, næmingum og skúlafólki í mun til javnstøðu.

Í hesum sambandi var greitt, at fortreytin fyri, at skúlin kann arbeiða við javnstøðu er, at lærarin fyrst lærir um javnstøðu.

### Lærarin á odda

Verkætlanarleiðari á Íslendska Javnstøðustovninum, Arnfríður Aðalsteinsdóttir, greiddi á ráðstevnuni frá um arbeiðið í Íslandi. Eitt nú verkætlanina ”Javnstøða í barnagarði og fólkaskúla”, sum fevnir um eina heimasíðu og um undirvísingartilfar og -tilgongdir fyri fólkaskúlan. Men niðurstøðan var púra greið: Í staðin fyri at byrja við at undirvísa næmingunum í javnstøðu, áttu tey heldur at vera byrjað við lærarunum!

Tí verður næsta stóra stigið í Íslandi at styrkja førleikarnar hjá lærarunum í mun til javnstøðu, og verður hetta ein størri partur av læraraútbúgvingini og eftirútbúgving lærarannaframyvir.

### Javnstøða fleiri vegir

Endmálið við at taka javnstøðu við inn í skúlarnar er at víðka um møguleikarnar hjá tí einstaka at liva tað lív, og at fáa tað starv, sum viðkomandi hevur hug og evni til – óansæð kyn. Tí er eisini neyðugt at gera upp við stereotypu myndirnar av kynunum.

Evnið javnstøða kann handfarast á ymsan hátt í skúlunum. Í hinum Norðurlondunum arbeiða tey nógv við, at lærarin skal vera varugur við, hvussu hann samskiftir við næmingar og foreldur. Allar kanningar vísa, at lærarar lova dreingjunum at tosa nógv meira enn genturnar. Teir tosa eisini harðligari við dreingirnar og revsa teir harðari. Sum heild verða næmingar, sum uppføra seg øðrvísi enn kynið ”eigur” illa lýddir. Femininir dreingir verða argaðir, og maskulinar gentur verða settar upp á pláss.

Eitt annað, sum lærarin kann arbeiða við er, hvussu hann samskiftir við heimini. Til dømis ber til at ringja til pápan, tá eitthvørt er. Kanningar vísa, at hetta kemur sjáldan fyri. Men, tá pápin verður tikin við, og á tann hátt fær størri ábyrgd fyri skúlagongdini hjá barninum, hevur tað positiv árin á allar partar.

Ein onnur fortreyt fyri einum væleydnaðum javnstøðuarbeiði í skúlanum er sjálvsagt, at hóskandi undirvísingartilfar er til taks. Hetta er framvegis ein mangul her í Føroyum, men sum skilst er helst eitthvørt tilfar ávegis.

## Temavika um javnstøðu

**Føroyski fólkaskúlin skal hava eina evnisviku um javnstøðu í skúlaárinum 2010-2011. Hetta sigur Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í skúlamálum, sum fer undir fyrireikingarnar beinanvegin**

UNDIRVÍSING
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í skúlamálum, luttók á ráðstevnuni um javnstøðu í skúlanum, sum var í Norðurlandahúsinum í gjár.

Í tí sambandi flutti hon fram røðu, har hon hugleiddi um týdningin av at arbeiða við javnstøðu í skúlunum. Eitt nú lovaði hon at skipa fyri einari evnisviku um javnstøðu í fólka- og miðnámsskúlunum skúlaárið 2010-2011.

- Í 2009-10 eru evnini rørsla og veðurlag nógv á breddanum. Tí vænti eg, at tað er best at skipa hetta tema í skúlaárinum aftaná, sigur Helena Dam á Neystabø, sum beinanvegin ætlar sær at seta ein fyrireikingarbólk í sambandi við temavikuna

-Eg komi í røðuni inn á fleiri av teimum evnum, ið ein tílíkur temadagur eigur at fevna um. Men tað liggur sjálvsagt ikki fast enn, hvat er best egnað at arbeiða við innan ymsu skúlarnar, sigur hon.

Eisini væntar hon, at fáa meira burturúr, um arbeiðið er væl fyrireikað, til dømis við hagtølum og undirvísingartilfari.